# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 05.03.2018 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Niels Jacob Thomsen
Sten Spange Larsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at flyta mál nr. 7 til ikki almenn mál – einmælt samtykt.

1. **Umsókn um stuðul til ráðstevnu um ferðavinnu frá lesandi á Fróðskaparsetri Føroya.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla tiltakinum.

2. **Til ummælis – umsókn um sundurbýti av matr. nr. 160c, Hvalba.**
   Søkt verður um, at luturin Bíarvegur 131 verður frábýttur. Samtykt varð einmælt at viðmæla sundurbýtinum.

3. **Skúlagarðurin.**
   Í sambandi við, at skúlastýrið arbeiðir við at dagføra skúlagarðin, er meting gjørd av, hvat niðurtøka av WC-bygninginum kostar. Metti kostnaðurin er kr. 30.000 fyri niðurtøku, burturbeining av tilfari, arbeiðsløn og planering av øki.

   **Trivnaðarnevnd 02.03.2018:**
   Nevndin mælir til, at John Hammer, arbeiðsformaður saman við arbeiðsfólki tekur sær av hesum arbeiði.

   **Fíggjarnevndin 05.03.2018:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til, at WC-bygningurin verður tikin burtur sambært kostnaðarmeting.

   **Avgerð:** Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum frá Trivnaðarnevnd og Fíggjarnevnd.

4. **Byggisamtyktin.**

**Tekniska nevnd 02.03.2018:**
Mælt verður til, at leggja broyttu byggisamtyktina, ið Kári Thomsen hevur staðið fyri fram við broytingum.

**Vega- og havnanevnd 03.03.2018:**
Nevndin hevur gjøgnumgingið nýggju byggisamtyktina og hevur ongar viðmerkingar til hesa og mælir til, at hon verður løgd fram alment og til víðari viðgerð.

**Avgerð:** Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum og leggja byggisamtyktina fram við broytingum.

5. **Búlendislýsing av Hamranesi.**
Biofar hevur eftir umbøn frá Vega- og havnanevndini gjørt kostnaðarmeting av einari búlendislýsing av økinum á Hamranesi.

**Vega- og havnanevnd 03.03.2018:** Eftir at hava fingið eina kostnaðarmeting frá Biofar, hevur nevndin kannað, um tað eru aðrir veitarir til hesa uppgávu í Føroyum. Niðurstøðan er, at tað ikki eru aðrar fyritøkur við serkunnleika á hesum øki. Mælt verður tí til at taka av tilboðnum frá Biofar.

**Fíggjarnevndin 05.03.2018:**
Einmælt samtykt at mæla til, at búlendislýsingin verður gjørd sambært kostnaðarmeting frá Biofar.

**Avgerð:** Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum frá nevndunum og taka av tilboðnum frá Biofar kr. 100.000 + MVG.

6. **Reglugerð fyri bingjuplássini.**
Í sambandi við vaksandi rusknøgdirnar, ið verða latnar bingjuplássunum í sóknini, hevur Tekniska nevnd viðgjørt hetta mál.

**Tekniska nevnd 02.03.2018:**
Nevndin hevur gjørt uppskot til reglugerð fyri bingjuplássini og kunningarskriv til húsarhaldini í sóknini. Upplatingartíðirnar leygardag verða broyttar til kl. 15.00 til 17.00.

**Avgerð:** Samtykt varð einmælt at taka undir við reglugerðini fyri bingjuplássini við broytingum.

**7. Málið flutt til mál nr. 9 – ikki almenn mál.**

**8. Arbeiðsbilur.**

Tekniska nevnd hevur heintað inn fýra ymisk tilboð uppá arbeiðsbil: frá Nordcar, Berg Motors, Waag Bilar og Wenzel.

**Avgerð:** Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum frá Waag Bilar kr. 317.360 uttan MVG.

**9. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.45

| | | |
|---|---|---|
| Janus Thomsen | Eir J. Norðberg | Magni Bertholdsen |
| Niels Olaf Eyvindsson | Niels Jacob Thomsen | Sten Spange Larsen |